Filadelfia
„Himmal á jørð“



# Latið streymarnar renna

Tað gongur ikki altíð sum vit ætla tað og hesa sannroynd mugu vit bara staðfesta enn eina ferð, nú Kurt og Inger boðaðu frá, at Føroyaferð teirra á hesum sinni er avlýst vegna sjúku.

Vit gleddu okkum sjálvandi bæði til tað Orð, ið Kurt eftir ætlan skuldi deila við okkum í dag (31/8) og til tímiliga og andaliga felagskapin við tey bæði, sum vit nú í nógv ár hava notið við jøvnum millumrúmum. Hóast at tað tí harmar okkum, at henda ferð teirra varð til onkis, so eru vit takksom fyri relatiónina og ikki minst ta opinbering um týdningin av lívinum í Heilaga Andanum, sum Kurt lutaði við okkum fyri skjótt 40 árum síðani, tá hann gjørdist fyristøðumaður í Filadelfia.

Henda opinbering hevur verið – og er enn – ein dýrabarur skattur, sum vit hava bygt á og virkað út frá síðani. Hóast nógv er broytt gjøgnum hesi mongu ár, eru Guds Orð og nærvera Heilaga Andans enn grundarlagið, sum vit byggja á. Vit koma saman fyri at tilbiðja Gud í felagskapi og fyri gjøgnum Guds orð og í nærveru Hansara at mennast og búnast í ríki Guds, til at gera tað arbeiði, ið Hann hevur kallað okkum til.

Latið okkum tí, nú heystið stendur fyri durum og alt virksemið koyrir við fullari ferð aftur, altíð minnast endamálið; vit ynskja at kunngera Ríki Guds, at menniskju skulu møta Gudi, verða sett í frælsi og at dýrd Hansara skal vaksa í og úr okkara landið. Latið okkum tí raðfesta at brúka tíð saman við Gudi, so Heilaga Andans lív í størri og størri mun kann streyma úr okkum – líka mikið hvørjur umstøðurnar eru.

*NAA og AMD*

# BARNAMØTINI







Sunnudagin 23. aug byrjaðu barnamøtini aftur aftaná summarsteðgin. Vit høvdu lýst við veitslu á slottinum og tað bleiv av sonnum ein góð og hugnalig veitsla. Lea hevði pyntað rúmið so vakurt, so tað var sum á einum slotti. Vit høvdu dekkað langt borð og matarskráin var pasta við grønmetissós, reyða sodavatn og frukt omaná.

# SEPTEMBER 2026

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudagur | 2. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 5. | | **Reingerð:** Conny |
| Sunnudagur | 6. | Kl. 11.00 | **FAMILJUDAGUR** |
| Mánadagur | 7. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: |
| Mikudagur | 9. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 12. | | **Reingerð:** Katy |
| Sunnudagur | 13. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Sam<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Nóa<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Alex |
| Mánadagur | 14. | Kl. 19.00 | **Felags bønarmøti í fríkirkjuni Vegurin** |
| Mikudagur | 16. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 19. | | **Reingerð:** Ingun |
| Sunnudagur | 20. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbrót. Innsavnar til húsið**<br>**Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: Gerd, Anfinn og Fríðbjørn<br>Ábyrgd/leiðari: Anfinn N.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Einar Joensen |
| Mánadagur | 21. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: |
| Týsdagur | 22. | Kl. 19.30 | **Samkomufundur** |
| Mikudagur | 23. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Hósdagur | 24. | Kl. 20.00 | **Hugnaløta fyri kvinnur og ungar gentur**<br>Ábyrgd: Margreth og Linda |
| Leygardagur | 26. | Kl. 10.00<br>Kl. 11.30 | **Kafé**<br>**Lærusveinaskúlin**<br>**Reingerð:** Ása O. |
| Sunnudagur | 27. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Marner<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Ása O. |
| Mánadagur | 28. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Mikudagur | 30. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

➥ *Barnamøtini framhald*






Teir komandi sunnudagarnar fara vit at hoyra um Dánjal og dreymar kongsins, eldovnin, leyvurnar og um Esther drotning.

Minniversið: „Lær meg at gera vilja Tín, tí Tú ert Gud mín, lat góða Anda Tín leiða meg.“

Vit vilja heita á samkomuna um at hava børnini við í bønum tykkara og biðja um styrk til barnamøtini. *Vh Conny*